# Vitjaðu umborð á

**Hjúnini Elsa og Poul Johan Djurhuus hava vitjað umborð á Logos Hope, sum er gamla Norrøna. Nú er skipið trúboðaraskip, og leiðarin umborð á Logos Hope greiðir frá, at føroyingar hava høgan kurs umboð. Poul Johan Djurhuus hevur latið okkum hesa frásøgnina um vitjanina umborð á Logos Hope**



Poul Johan Djurhuus saman við leiðgaranum umborð á Logos Hope, Mike Hay, ið er ættaður úr Australia

## Logos Hope



**Poul Johan Djurhuus**

Vit hava aftur verið á Malta í Hirtshals, og eftir at hava verið við á páskaleguni, sum Malta skipar fyri á hvørjum ári, sluttaðu vit á hesum sinni. Vit vóru á Malta frá november til hálvan mars, sum er tað vanliga tíðarskeiðið, vit eru har.

Tá vit vóru liðug á Malta fóru vit at vitja fleiri heim í Suður Jyllandi, sum vit koma í samband við ígjøgnum mánaðarligu møtini, sum Malta skipar fyri har. Tá vit eru upptikin av møtunum er ikki so nógv tíð til at vitja, tí tóku vit eina viku burturav til hetta. Tað var ein sonn gleði at koma inn í hesi heimini og njóta teirra samfelag. Vit vóna at signingin gekk báðar vegir.

### Gamla Norrøna í Kiel

Eisini gjørdu vit ein túr til Kiel í Týsklandi, har trúboðaraskipið hjá Missiónsfelagsskapinum OM, Logos Hope, liggur. Logos Hope er gamla Norrøna, og tí var tað serliga áhugavert at fara túrin. Tað tók einans 2 tímar at koyra úr Sønderborg, har vit eisini høvdu vitjað fólk, til havnalagið í Kiel. Tá vit nærkaðust havnalagnum var tað sjálvsagt gomlu Norrønu, sum vit royndu at fáa eyguni á, og tað gekk ikki leingi, so sóðu vit hana. Tað var so heimligt at síggja gomlu Norrønu, hetta skipið, sum vit øll vórðu so góð við, og sum vit framvegis hava møguleika at vera góð við.

### Føroyska Merkið

Hóast hon hevur skift eigara og navn, og skal sigla á øllum heimsins høvum, so er hon framvegis undir føroyska flagginum, sum veittraði har afturi á skipinum. Tí var hetta ein kenslu-borin løta, tá vit spakuliga koyrdu oman ímóti skipinum.

Eg má viðganga, at hon sýntist so lítil hesa løtuna vit koyrdu oman ímóti landgongini, men tað komst nokk av, at ein samanbar hana við núverandi Norrønu, sum er nakað væl størri. Men um hon virkar lítil ella ikki, so má ein sanna, at tænastan er stór, sum Gamla Norrøna skal inn í.

### Ein stór tænasta

Við umleið 400 fólkum innan-borða skal hon sigla um øll heimsins høv, har milliónir av menniskjum fara at ganga niðan og oman eftir leytarinum til tess at fáa evangeliið, annaðhvørt við talu, vitnisburði, sangi, leiki ella lesnaði. Her kann ein siga, at krossurin í flaggi okkara kemur til sín rætt, tí tað verður boðskapurin um krossin, sum manningin á Logos Hope skal kunngera.

Bøn okkara má tí vera, at orðið (logos) sum kunngjørt verður, má geva mongum neyðstøddum vón (hope), og soleiðis vil gamla Norrøna koma at sigla upp til sítt nýggja navn Logos Hope, sum merkir - Orð Vónarinnar.

Logos Hope er skrásett í Tórshavn og kemur framyvir at sigla undir Føroyskum flaggi – hetta meini eg, at allir føroyingar kunnu vera stoltir av.

### Leiðslan

Leiðarin umborð, sum á enskum verður róptur Director, eitur Mike Hay. Hann er ættaður úr Australiu. Eg kom at kenna hann persónliga, tá OM-skipið Doulos vitjaði í Føroyum í juni í 2004. Eg hevði sagt honum frá, at eg og konan ynsktu at koma umborð at vitja mikudagin 02. apríl. Vit vóru hjartaliga vælkomin, og avtalan var, at vit skuldu koma til døgurðan kl.12.00 Vit ótu døgurða saman við Mike Hay og konuni Ann og ynsktu dóttur teirra.

Mike segði okkum frá arbeiðinum umborð og um nýggju ferðaætlanina hjá "Gomlu Norrønu."

Hann sigur, at hann kennir nógvar føroyingar, sum hava verið við OM ígjøgnum árini, og hann rósar føroyingunum fyri teirra dugnaskap á sjónum, og serliga sum maskinmenn. Hann minnist, at einaferð fingu teir maskintrupuleikar millum lond. Tað sá svart út, men var tað ikki fyri dugnaskapin hjá føroysku maskinmonnunum umborð, so høvdu teir ikki loyst trupuleikan í bræði. Mike Hay letur heilsa, at teir hava brúk fyri fleiri hugagóðum motor- og maskinfólkum umborð á Logos Hope, og at føroyingar hava høgan kurs umborð. Um onkur ynskir at vita meiri um hetta kunnu tit seta tykkum í samband við umboðsmannin í Føroyum, Karl Robert Vang, Tórshavn.

### Liðugt til sigling

Spurdur um hvat líður skipinum at verða liðugt, svaraði hann, at 80% av umvælingararbeiðinum og ymiskur útbúnaður til klárgering av skipinum er gjørt, men enn eru nakrar verkætlanir í gongd, sum mugu verða gjøgnumførdar, áðrenn skipið fær trygdargóðkenning sum ferðamannaskip.

Mike vónar, at Logos Hope verður liðug at fara í sigling í juli/august. Úr Landskrona verður farið til Køge, sum liggur beint sunnanfyri Keypmannahavn, har skipið kemur at liggja nakrar dagar. Í Køge verður endalig hond tikin um onkrar snøklar, sum eru eftir at gera, og hesar dagar fer almennigurin at fáa høvið at koma umborð at síggja skipið og keypa bøkur og verða við til fundir av ymiskum slag umborð. Eisini fer manningin at vitja samkomur og kirkjur og at evangelisera m.a. í Keypmannahavnarumráðnum. Biðið fyri hesi vitjan í Danmark, at ein andalig veking má spyrjast burturúr, tí einans ein andalig veking kann bjarga okkum undan teimum myrku vindum, sum blása inn yvir landið og fólkið. Endamálið er at vera ljós og salt í øllum londum, har skipið kemur í havn.

### Føroyar

Mike sigur, "at okkara bøn, vón og ynski fyri Gudi er, at okkara fyrsta sjóferð má verða til Føroyar," og so leggur hann afturat, at hann vónar at føroyska fólkið vil fagna hesi ætlan, og tað kundi eg vissa hann um.

Vit skemtaðu eitt sindur okkara millum, tá annar nevndi, at møguliga hevði tað verið eitt gott hugskot, at gjørt eina framsýningarferð runt oyggjarnar, tá komið verður til Føroyar, og hála í skipsfloytuna inni á firðum og víkum. Eg trúgvi, at hetta hevði verið ein effektiv marknaðarføring av fyrstu vitjanini hjá Logos Hope í Føroyum.

### Sjúkradeild

Møguleikarnir at økja um tænastuna, bæði umborð og í landi, økjast við nýggja skipinum. Nú verður ein væl útgjørd heilsudeild umborð, bæði við tannlæknaklinik og læknaklinik, við pláss fyri tveimum læknum. Eisini verður ein sjúkrastova við fleiri seingjarplássum. Ein slík sjúkradeild kemur eisini at røkja heilsustøðuna og vælferðina hjá manningini, og kemur so statt at betra lívskvalitetin umborð. Báðar klinikkirnar eru soleiðis háttaðar, at tær eru flytbarar eindir (mobilar).

- Hetta ger tað møguligt hjá okkum, í samarbeiði við aðrar fekagsskapir, at fara inn í vanlukkurakt økir og veita professi-